# Avloysari fyri marknaðarfólk í Pf. Postverk Føroya

Pf. Postverk Føroya sóknast eftir avloysara til Frímerkjadeildina fyri marknaðarfólk í barnsburðarfarloyvi at byrja í seinasta lagi 19. mars 2007. Starvið er 35 tímar um vikuna og í fyrsta umfari tíðaravmarkað til 31. desember 2007.

**Starvið**
Starvið er samansett av málsligum og grafiskum uppgávum. Av málsligum uppgávum kunnu nevnast samskifti við franskar kundar og við lýsarar úr øllum heiminum. Grafisku uppgávurnar umfata sniðgeving og uppsetan av frímerkjum, faldarum, lýsingum og øðrum prentaðum tilfari. Viðlíkahald av heimasíðu er somuleiðis partur av uppgávuni. Tvey fólk starvast í løtuni á marknaðardeildini.

**Førleikakrøv**
Umframt góðan telduførleika, hevur tú grafiskar royndir og dugir at arbeiða við Adobe CS2 forritunum: InDesign, Photoshop og Illustrator. Tú skalt kunna samskifta á fronskum og hevur harafturat góðan førleika í føroyskum, donskum og enskum máli.

**Pf. Postverk Føroya, Frímerkjadeildin bjóðar tær**
eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í altjóða umhvørvi.
Løn smb. sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Postfelag.

**Umsókn**
Áhugað eru vælkomin at venda sær til Duritu Jacobsen á Frímerkjadeildini tlf. 346200 fyri at kunna seg um starvið.

Umsóknir við hóskandi prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi 19. februar 2007 og skulu sendast til:

Pf. Postverk Føroya
att: Heri Kjærbo
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

ella um teldupostin til: heri.kjarbo@postur.fo

Pf. Postverk Føroya

Postverk Føroya




Frímerkjadeildin er útflutningsfyritøka burturav við einum árligum umsetningi á 24 mió. kr. og hevur um 30.000 viðskiftafólk kring allan heim. Á Frímerkjadeildini, ið veitir tænastur á fimm ymiskum málum, starvast um 35 fólk, sum fáast við alt frá hugskoti og sniðgeving til marknaðarrøkt, kundarøkt og pakking.

Umframt at geva út frímerki til nýtslu í føroyska postverkinum, er høvuðsuppgávan hjá Frímerkjadeildini at selja føroysk frímerki til savnarar uttanlands.

**www.stamps.fo**

**Pf. Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · 100 Tórshavn · Tlf. 346000 · www.postur.fo**

---

VINNUMÁLARÁÐIÐ
KT-FYRISITINGIN

# Søkt verður eftir starvsfólkum til KT-skivuna

Vinnumálaráðið søkir eftir tveimum starvsfólkum til KT-skivuna hjá KT-fyrisitingini.

KT- fyrisitingin er ein deild í Vinnumálaráðnum, ið tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild.

KT-fyrisitingin útvegar undirstøðukervi, felags nýtsluskipanir og standardforrit, sum fyrisitingarligar eindir hjá landinum kunnu fáa atgongd til. Hetta undirstøðu kervið verður nevnt LandsNET, og er eitt rættiliga stórt kt-kervi við gott 500 brúkarum, og støðugt vaksandi.

**Starvið:**
Uppgávan hjá KT-skivuni er í høvuðsheitum at ráðgeva og vegleiða teldubrúkarum, tá hesir hava tørv á hjálp. Talan kann verða um ráðgeving og vegleiðing í nýtslu av felags nýtsluskipanunum og standardforritum ella meiri tekniskari hjálp.

**Arbeiðsuppgávur**
- taka ímóti og skráseta fyrispurningar frá brúkarum
- um gjørligt, at hjálpa brúkaranum við trupulleikum
- senda fyrispurningar víðari til serkøn innan KT
- tryggja, at brúkari fær hjálp
- brúkaraumsiting

Talan er um ein nýtt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann, sum settur verður, tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarum, at teir hava:

- Kunnleika og royndir innan KT
- Royndir við teimum vanligastu KT-forritunum (MS Office og øðrum)
- Hegni til at vegleiða brúkarum í nýtsluni av KT
- Viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir innan KT
- Ídni, áræði og góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har ið tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við starvsfólkini í landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur stjórnarráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2007. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Gunnar Toftegaard, tlf. 35 60 78.

---

Kirkju- og Missiónshúsið á Argjum

# Missiónsvika

Í døgunum frá 5.-11. februar

**Mánadagur 5. februar kl. 19.30**
Talari: Sverri Steinhólm
Sangur: Húsins fólk

**Týsdagur 6. februar kl. 19.30**
Talari: Sólrun Poulsen
Sangur: Ungdómskórið í Meinigheitshúsinum

**Mikudagur 7. februar kl. 19.30**
Talari: Frits Thomsen
Sangur: Martha og Tummas Pauli Mýri

**Hósdagur 8. februar kl. 19.30**
Talari: Niels Jacob Nielsen
Sangur: Sangkreftir av Toftum

**Fríggjadagur 9. februar kl. 19.30**
Tey ungu skipa fyri.
Talari: Alfred Olsen

**Leygardagur 10. februar kl. 19.30**
Talari: Hjørleif Poulsen
Sangur: KFUM & K-kórið í Klaksvík

**Sunnudagin 11. februar**
Familjugudstænasta: Kl. 14.00
Sunnukvøld: Møti kl. 18.00
Talari: Thomas Dam
Sangur: Manskórið í Vágum

**Í vikuskiftinum vera møtini í Argja skúla!**
**Bønarløta er hálvan tíma áðrenn.**

**Hjartaliga vælkomin!**

**Stýrið**

---

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við